# Danir áhugaðir í føroyskum prestastørvum

**Í løtuni eru eingir prestar settir í Vági og Hvalvík, men hesi størv verða væntandi sett einaferð í vár. Fleiri danir hava víst áhuga fyri at koma hendanvegin**

TRÚARLÍV

*Theodor E. D. Olsen*



*Kirkjan hon er eitt gamalt hús, men hon stendur enn, hóast føroyingum tørvar prestar. Størvini í Vági og Hvalvík verða væntandi sett til várs*

Liðið av prestum í Føroyum er ikki fullmannað í løtuni.

Í Hvalvík hevur eingin prestur verið eina tíð, og herfyri segði vágsprestur seg eisini úr starvi.

Hans Jacob Joensen, bispur, sigur, at starvið í Vági ikki er lýst leyst enn, av tí at so stutt tíð er liðin, síðani prestur fór haðani.

Hinvegin er freistin at søkja starvið í Hvalvík sett til 3. februar, og umleið hálvan februar væntar bispur at fáa innkomnu umsóknirnar frá danska kirkjumálaráðnum.

Mannagongdin er nevniliga tann, at um ein situr í einum prestaembæti frammanundan, skal verða søkt gjøgnum próstin hjá einum sjálvum, ið síðani sendir umsóknina til bisp. Hann letur so Kirkjumálaráðnum umsóknina. Hinvegin er ikki neyðugt at søkja gjøgnum próst, um ein ikki situr í embæti.

Eftir at bispur hevur fingið umsóknirnar frá kirkjumálaráðnum, skal hann kunna kirkjuráðið um umsóknirnar, sum komnar eru inn, og kann kirkjuráðið síðani biðja umsøkjararnar koma til eina samrøðu ella royndarprædiku.

Hóast báðir prestarnir í Vági og í Hvalvík vóru danir, so sær ikki út til, at danir ongan hug hava at koma hendan vegin at røkja prestagerningin í føroysku kirkjuliðunum. Hans Jacob Joensen upplýsir, at fleiri danir vísa áhuga at koma hendanvegin. Enn ber sjálvandi ikki til at siga talið á umsóknum, men um føroyingar søkja, hava teir helst ein fyrimun málsliga, heldur bispur.

Prestastørv verða sett frá fyrsta degi í einum mánaða, og roknar bispur við, at næsti hvalvíksprestur verður settur í starv 1. apríl, um tað gongur skótt, at viðgera umsóknirnar, men møguliga verður bíðað til 1. mai.

### Vónríkir vágbingar

Hóast vágbingar eftir øllum at døma koma at bíða eitt sindur longur eftir, at prestur verður settur í fast starv í bygdini, so ivast Johannis Østerø, formaður í kirkjuráðnum í Vági, ikki í, at nýggjur prestur skjótt verður settur í Suðuroyar Sunnara Prestagjaldi.

Í Suðuroynni hava tey tó loyst trupulleikan av, at tað í løtuni bert eru tveir prestar í oynni.

Jónsvein Bech, prestur á Tvøroyri, tekur sær av norðaru helvt av oynni, meðan Ólavur Rasmussen, sum annars er vanliga er prestur í Hvalba skal taka sær av bygdunum í sunnaru helvt, sum eru Vágur, Hov, Porkeri, Leiti, Akrar og Sumba.

- Aldantíð at prestur er, so ber altíð til at seta seg í samband við hann, sigur Johannis Østerø, sum kortini viðgongur, at prestur sjálvandi hevur meira at gera, tá ikki hann og starvsfelagarnir fækkast í tali. Men Ólavur Rasmussen skal í øllum førum taka sær av konfirmatiónini til várs, og tá vænta vágbingar og onnur í sunnara helvt av Suðuroynni at vita nærri, um hvør skal búgva í prestagarðinum í Vági framyvir.

Seinast vóru tvær umsóknir til prestastarvið í Vági.

# Løgmaður má kanna Fiskimálaráðið

**Hóast Henrik Old ikki metir, at fiskivinnumál eru løgmanni heilt fremmand, so eigur hann kortini at skunda sær at seta nýggjan landsstýrismann. Men áðrenn má løgmaður syrgja fyri, at næsti fiskimálaráðharri ikki endar í somu støðu sum Jørgen Niclasen**

POLITIKKUR

*Theodor E. D. Olsen*



*Formaðurin í Vinnunevndini., Henrik Old, heldur, at løgmaður eigur at syrgja fyri, at næsti maður í sessinum ikki endar í somu støðu sum undanfarni landsstýrismaður við fiskivinnumálum*

Hóast 16 dagar eru farnir, síðani Jørgen Niclasen valdi at siga seg úr starvi sum landsstýrismaður, áðrenn Løgtingið atkvøddi fyri einum misáliti á hann, er enn eingin nýggjur fiskimálaráðharri settur.

Hóast dúgliga hevur verið gitt, hvør næsti maður ella kvinna kemur í at sita sessinum, so vil eingin siga nakað um, hvørji eru í uppskoti at umsita fiskivinnumál í Tinganesi.

Onkur av fólkafloksmonnunum í tingbólkinum hevur tó dittað sær at sagt, at tað helst verður onkur av tingmonnum floksins, men navn er ikki sett á tann næsta ráðharran enn.

### Løgmaður kennir til fiskivinnumál

Henrik Old úr Javnaðarflokkinum, ið er formaður í Vinnunevnd Løgtingsins, sigur í samrøðu við Sosialin, at hóast tað ikki akkurát ber til at siga, hvussu nógvir dagar skulu ganga, til nýggjur landsstýrismaður við fiskivinnumálum verður settur, so er vit nú komin her til, at ein støða má takast.

Henrik Old leggur tó kortini afturat, at Anfinn Kallsberg, løgmaður, er í tí hepnu støðu, at hann áður hevur umsitið fiskivinnumál í Landsstýrinum, og at tað tí ikki er honum heilt fremmant. Harafturat hevur hann umsitið onnur mál í Tinganesi. Tí kennir Anfinn Kallsberg væl til ráðharraarbeiði, og sum so umsitur hann ikki so nógv mál. Men hóast tað, er talan um okkara høvuðsvinnu, sigur formaðurin í Vinnunevndini.

Henrik Old heldur tó, at sæð frá einum politiskum vinkli, so hevur løgmaður kanska drálað so leingi, av tí at umrokeringar eru á veg í Landsstýrinum, og at hann tí ikki vil seta nakran, sum hann noyðist at koyra frá stutta tíð eftir.

### Eitt skifti loysir ikki trupulleikan

Henrik Old sigur, at løgmaður eigur at umhugsa og kanna umsitingina í Fiskimálaráðnum, áðrenn nýggjur fiskimálaráðharri verður settur, og tað væntar hann eisini, at løgmaður ger. Tað, at ein landsstýrismaður er farin frá, loysir nevniliga ikki trupulleikan, og tí eigur Anfinn Kallsberg at kanna, um tað er landsstýrismanninum ella umsitingini, tað er galið við, tí um so er, at tað er galið við umsitingini, so verður tann næsti landsstýrismaðurin »på Herrens mark«, sum formaðurin í Vinnunevndini tekur til.

Løgmaður hevur evstu ábyrgdina av hasum, og tí eigur hann eisini at kanna, hví tann fyrri landsstýrismaðurin fór, sigur Henrik Old.

Hann væntar, at Anfinn Kallsberg man fara at seta nýggjan fiskimálaráðharra í næstu viku, og at Fólkaflokkurin fer at fundast áðrenn vikuskiftið er byrjað. Hetta vilja umboð úr Fólkaflokkinum kortini ikki vátta fyri Sosialinum.

Men hóast Jørgen Niclasen varð noyddur at siga seg úr landsstýrissessinum 14. januar, og vit í dag skriva 30. januar, so metir Henrik Old ikki, at limirnir í Vinnunevndini hava heimild til at gera nakað við, at nýggjur fiskimálaráðharri ikki er settur enn, men hann leggur enn einaferð dent á, løgmaður eigur at syrgja fyri, at næsti maður í sessinum ikki endar í somu støðu sum undanfarni landsstýrismaður við fiskivinnumálum.



# Sjálvstýrissemja í eygsjón



*Andstøðan kann helst taka undir við yvirtøkuleistinum hjá løgmanni, heldur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins*

**Javnaðarflokkurin tekur undir við yvirtøkuleistinum hjá løgmanni. Formaður floksins fegnast um, at møguleikarnir í heimastýrislógini loksin verða gagnnýttir. Nú eigur orka at leypa av til veruligan politikk í Føroyum, heldur Jóannes Eidesgaard.**

POLITIKKUR

*Ingi Rasmussen*

Yvirtøkuleisturin hjá løgmanni skuldi ruddað slóð fyri, at vit fáa eina semju í Føroym um sjálvstýrismálið, og tann semjan er ótrúliga týdningarmikil.

Soleiðis sigur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum. Sostatt bendir alt á, at ein semja um sjálvstýrispolitikkin er í ljósmála eftir naggatódn og ósemju í áravís.

Formaður Javnaðarfloksins heldur í øllum førum, at nýggi yvirtøkuleisturin hjá løgmanni ber boð um, at øll andstøðan kann taka undir við tí politikki á sjálvstýrisleið, sum samgongan setir út í kortið.

– Javnaðarflokkurin gleðist yvir, at tað endiliga er gingið upp fyri løgmann og samgonguna, at tað eru fleiri møguleikar at fremja føroyskt sjálvstýri enn tann, sum hevur verið leisturin hjá samgonguni higartil, sigur Jóannes Eidesgaard, sum eisini heldur, at Sambandsflokkurin átti at kunnað tikið undir við yvirskipaða leistinum.

### Savnar málsøki

Uppskotið hjá løgmanni snýr seg í stuttum um at savna øll tey málsøki, sum liggja uttan fyri heimastýrislógina í eina yvirtøkulóg. Hon skal samtykkjast í Fólkatinginum og løgtinginum.

Endamálið hjá løgmanni er at fáa greiðar karmar um allar yvirtøkur í framtíðini, so at sjálvstýrispolitikkurin verður fluttur til Føroya og fingin í eina fasta legu.

Í roynd og veru er uppskotið ongin kollvelting av heimastýrislógini. Hon verður standandi og skal tráðnýtast til at yvirtaka øll málsøki í henni.

Uttan fyri heimastýrislógina liggja millum annað útlendingaøkið, revsirættarliga økið og persóns-, familju og arvarættarliga øki. Tey skulu yvirtakast við eini og somu yvirtøkulóg. Tað merkir tó samstundis, at eitt nú løgreglan framvegis verður felags mál, sum sambært heimastýrislógini má yvirtakast við samráðingum.

– Um hetta er ein nútímansgerð ella víðkan av heimastýrislógini, haldi eg ikki, at vit skulu brúka so nógva orku uppá. Hóast okkara sjálvstýrislóg varð meira víðgongd, so var hon bara meint sum eitt útspæl til samráðingar, og tí vil Javnaðarflokkurin eisini taka undir við leistinum hjá løgmanni, sigur Jóannes Eidesgaard.

Sjálvstýrislógin hjá Javnaðarflokkinum hevði millum annað við sær, at øll mál skuldu kunna yvirtakast einsíðugt av løgtinginum. Tað inniheldur uppskotið hjá løgmanni ikki, tí heimastýrislógin verður standandi. Harafturat varð mælt til, at broytingarnar skuldu staðfestast í altjóða samfelagnum. Hetta var ein snávingarsteinur, sum nú slepst undan.

### Til heiður og æru

Jóannes Eidesgaard heldur, at nýggi leisturin er ein viðurkenning av, at heimastýrislógin er amboðið, sum skal brúkast at vinna Føroyum fult sjálvstýri.

– Við teimum tillagingum, sum nú eru gjørdar, verður prógvað, at heimastýrislógin røkkur líka at loysingini. Heimastýrislógin hevur ongantíð verið nøkur forðing fyri føroyskum sjálvstýrispolitikki, men trupulleikin hevur heldur verið at funnið fram til nakrar semjur, sum bera á mál. Nú er tað vorðið ein spurningur hjá okkum at gagnnýta teir møguleikar, sum okkum verða givnir, og tað kunnu vit saktanst taka undir við, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Frígevur orku

Samanumtikið heldur formaður Javnaðarfloksins, at ein semja í Føroyum um sjálvstýrismálið eigur at frígeva orku at føra politikk í Føroyum.

– Tað hevur størst týdning av øllum, at vit finna ein leist, sum ger, at vit kunnu semjast, so vit kunnu brúka orkuna til at føra politikk heima hjá okkum. Og tað haldi eg meg síggja í hesum uppritinum hjá løgmanni, sigur Jóannes Eidesgaard.

**Fakta**

Grundprinsipp í yvirtøkuleisti

- Heimastýrisskipanin verður víðkað til eisini at umfata øll viðkomandi málsøki. Undantikin eru uttanríkismál, verjumál og heimarættur.
- Føroysku myndugleikarnir yvirtaka samstundis útreiðslurnar fyri málsøkini.
- Yvirtøkurnar av dómstólum og revsirættarliga økinum verða sett í gongd eftir samráðing millum løgmann og forsætisráðharran, tí hesi eru tekniskt fjølbroytt og eiga at vera samskipað við yvirtøkuna av løgregluni.
- Danski hægstirætturin verður framvegis hægsti dómstólur í felags málum.
- Yvirtøkuleisturin umfatar ikki málini á lista A og B í heimastýrislógini, ið halda fram sum nú.

*Kelda: Upprit frá løgmansskrivstovuni frá 27.09.2002*

## Hamarasløg í høvdið eru ikki drápsroynd

**Ein 48 ára gamal maður fekk fongsul í 9 mánaðir fyri at hava bukað eina kvinnu sera illa. Men dómarin helt ikki, at hamarasløg í høvdið prógvaðu drápsroynd**

HARÐSKAPUR

*Ingi Rasmussen*

30. desember 2002 kom ein illa bukað 49 ára gomul kvinna á Landssjúkrahúsið.

Læknarnir søgdu, at hon var heppin at vera á lívi og mæltu henni til at melda tilburðin.

Kvinnan var bankað við einum hamara, og ein skanning vísti, at hon hevði bløðingar í heilanum. Fýra ferðir varð kvinnan sligin í høvdið við hamaranum, eitt nú beint við tinningina, hon breyt armin, tá hon vardi fyri seg, og løstaði eisini bein og kropp.

Mánadagin feldi Føroya rættur dóm yvir 48 ára gamla harðskapsmannin, sum kvinnan tá livdi saman við.

Rætturin vildi ikki geva ákæruvaldinum viðhald í, at talan var um drápsroynd, og tí fekk maðurin einans fongsul í níggju mánaðir. Ákæruvaldið, sum varð umboðað í rættinum av Lindu Hesselberg, kravdi mannin dømdan í trý ár og níggju mánaðir, tí hon helt sløgini vitna um eina tilvitaða drápsroynd. Dómarin helt ikki, at tað var prógvað, at maðurin ætlaði at drepa.

Annars kom fram í rættinum, at maðurin hevði viðgingið á løgreglustøðini, at hann ætlaði at taka lívið av kvinnuni. Tá hann kom í grundlógaravhoyring, broytti hann tó frágreiðing. Nú viðgekk hann, at hann hevði framt harðskap, men ætlanin var ikki at drepa.

Tey bæði hava livað leingi saman í tokuni av rúsdrekka, rúsevnum og nógvum harðskapi.

Ákæruvaldið umhugsar nú at skjóta dómin inn fyri hægri rætt. Maðurin var hinvegin nøgdur við dómin, og tók í hondina á sínum dómara, áðrenn hann fór úr rættinum.